# Søgulig hending: Eingin minnis

**– Eg eri 81 ára gamlur og veit bert einaferð um, at ein hvalur áður hevur lagt beinini her úti; hesin hvalurin svam sjálvur upp á land, og tað var eg, sum skar hann á háls. Eg haldi, tað eru eini 30 ár síðan, sigur Jógvan Joensen, ið sigldi við trolara síni bestu ár, men sum síðan gjørdist bóndi í Svínoy**

SVÍNOY
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Helgi Mortensen*

Myndirnar, vit prenta á hesum báðum síðunum í dag, eru søguligar, hóast tær eru spildurnýggjar og tiknar seinasta leygardag í Svínoy.

Tað er Helgi Mortensen, sum hevur tikið og eigur myndirnar.

Saman við øðrum var hann í Svínoy í føðingardegi seinasta vikuskifti, tá ið ein lítil grind legði beinini.

### Vit fregnaðust

Sunnudagin, tá ið Sosialurin frætti, at nakrir hvalir høvdu lagt beinini í Svinoy, ringdu vit fyrst á løgreglustøðina í Klaksvík fyri at fregnast.

Jú, teir høvdu hoyrt um, at nakrir hvalir – helst einir 5 í tali, høvdu svomið sær upp á land í Svínoy.

- Men vit hava einki havt við hetta at gera, segði løgreglumaðurin, vit tosaðu við.

Í hesi løtu vistu vit einki um, hvørt grind áður er deyð í Svínoy. Tað kundi jú verið, at grind í sínari tíð er hildin til í oynni.

Vit tóku telefonina og ringdu til eitt tilvildarligt telefonnummar í oynni, Eyðun Jacobsen.

Hetta var um 18-tíðina seinasta sunnukvøld. Ein blíð kvinna tók telefonina og fortaldi, at húsbóndin var ikki inni, men bleiv aftur um 19-tíðina ella so.

Vit fregnaðust eitt sindur um grindina.

– Jú, nakrir hvalir eru deyðir, men legði kvinnan blídliga aftrat: Ringið aftur um eina løtu, tí Eyðun veit betur at siga frá.

Hon fortaldi, at henni kunnugt hevði bert ein hvalur áður lagt beinini í Svínoy – og tað eru nógv ár síðan.

### Hittu mannin!

Vit høvdu ikki tol at bíða.

Leitaðu aftur í telefonbókini, og nú duttu vit á navnið, Jógvan Joensen.

Jú, Jógvan tók telefonina, og hann var bæði blíður og tíðindafróður.

Hann visti at siga, at fimm hvalir høvdu lagt beinini í Svínoy.

- Eg eri 81 ára gamlur og veit bert einaferð um, at ein hvalur áður hevur lagt beinini her úti; hesin hvalurin svam sjálvur upp á land, og tað var eg, sum skar hann á háls. Eg haldi, tað eru eini 30 ár síðan.

Jógvan greiddi frá, at hóast hann var maðurin, sum einsamallur gjørdi enda á hvalinum, mundi meginparturin av bygdarfólkinum fáa bæði tvøst og spik.

- Hesin hvalurin var eini 4-5 skinn, so hann mundi røkka til meginpartin av fólkinum, sum tá var í oynni.


*Her liggur so fongurin, 5 hvalir, sum eru millum eini 4 og 6 skinn hvøn*


*Her er lív í við atløgubryggjuna í Svínoy. Roynt verður at seta fast á hvalirnar*


*Hugagóðir menn eru nærum lidnir at skera upp*